# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Freist til ársins virðislønir í dag

Tað hevur verið siður hjá teimum báðum stóru bløðunum, Sosialinum og Dimmalætting nú í fleiri ár at velja út ársins mann og kvinnu og ársins føroying. Hetta hendir júst í hesum døgum. Í kvøld verður samkoma á Dimmu, har ársins føroyingur verður heiðraður umframt at serligur heiður verður latin til ársins ítróttarbragd, mentanarbragd og ársins fløgu.

Tiltakið, sum Sosialurin skipar fyrri, verður í Miðlahúsinum júst um eina viku. Men freistin at koma við uppskotum til ársins mann, ársins kvinnu og ársins kjakvirðisløn er úti í dag. Enn ber tí til at senda inn uppskot antin sum bræv til Miðlahúsið, Tórsgøta 1, 100 Tórshavn ella sum teldupost til arsins@sosialurin ella post@sosialurin.fo. Lepar til at fylla út eru at finna í Sosialinum. Har eru so eisini umrøddar treytirnar fyri at kunna skjóta upp fólk, feløg ella stovnar.

Fyrstu ferð at ársins maður og ársins kvinna umframt ársins kjakvirðisløn vórðu latin av Miðlahúsinum í samstavi við Føroya Banka var í 2006. Tá vóru kosin Leila Solmunde, forkvinna í MBF fyri hennara ótroyttiliga arbeiði til frama fyri teimum brekaðu, Sofus Olsen, sáli fyri sítt slóðbrótandi arbeiði at fáa heimbygdini Sandi eitt listasavn og loksins Óli Petersen fyri sín leiklut í at menna almenna orðaskifti gjøgnum tekningar sínar. Í 2007 vóru tey kosnu Ella Müller m.a. fyri sítt sjálvbodna arbeiði at stuðla ungfólki, Birgir Enni fyri sítt stóra arbeiði at menna føroyska ferðavinnu og Amnesty International, Føroya deild fyri at hava lagt lunnar undir orðaskiftið um eitt nú mannarættindi.

Spennandi verður at frætta, hvørji trý fara at fáa virðislønirnar í ár. Eingin ivi er um, at mangir føroyingar eru, sum hava uppiborið hesar virðislønir. Tað fáa vit so at vita mikudagin 5. mars klokkan 16 í Miðlahúsinum.

**Sosialurin**

## Hvør eigur Tryggingarfelagið Føroyar?

**FINNLEIF GUTTESEN**
Tvøroyri

Tú og eg, tí øll, ið tryggja seg hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, eiga egin-ognina uppá 1,5 milliard krónur í samtakinum.

Tað syndarliga er, at vit fáa alt ov lítla gleði av hesari 1,5 milliard, sum vit eiga. Vit fáa brøv inn gjøgnum dyrnar um, at tryggingarnar skulu verða meira einfaldar, men tann gløggi lesarin hevur skjótt gjøgnumskoðað, at tær bert eru blivnar dýrari og vánaligari.

**Umboðsráði**

Tú ert kanska blivin uppringdur av onkrum, ið vil hava teg at velja seg nú val er, men har skalt tú hugsa teg væl um, tí teir 23 limirnir, ið hava sitið har higartil, hava ikki røkt tíni áhugamál viðvíkjandi tryggingum á nøktandi hátt eftir mínari meting.

Tað er torførari at stilla upp til umboðsráðið enn til løgtings- og fólkatingsval, tí tú skalt hava 25 stillarar, sum tú mást leita eftir á gøtuni, millum tryggingartakararnar. Til Løgtings- og fólkatingsval skalt tú bert hava 10 stillarar.

Hesir 23 umboðsráslimirnir hava valt seks limir av teimun 23 í eina nevnd, og hendan nevndin kann sjálv stilla valevni upp, hvørja ferð tað er val.

*Harvið hevur nevndin møguleika fyri at stilla nakrar "ryggklapparar" upp, og eru tað ikki fleiri valevni enn tey 11 ella 12, ið skulu veljast hvørja ferð, so koma hesi inn í ráðið og kunnu velja seg sjálvan í tað óendaliga, í hvussu so er, til tey eru 70 ár.*

So tað er ikki uttan orsøk, at uppstilling og valreglur er ein stórur fyrimunur hjá verandi umboðsráslimum.

**Nevndin**

Tá ið nevndin, ið er vald av umboðsránum, ikki hevur tryggingartakaran fremst í huga, eftir mínum tykki, so mugu vit velja onnur umboðsráðsfólk, enn tey, ið hava sitið higartil. Men her renna vit okkum aftur í trupulleikar, tí vit síggja ikki hvørji tey 11 eru, sum hava sitið har í fýra ár, vit síggja bert, at tveir nevndarlimir stilla uppaftur.

Vónandi eru tey, ið bjóða seg fram nú, ikki bert "jasigarar", sum vilja hava nakrar fundarpengar, men fólk ið hava tryggingartakaran í huga, tí tað er tryggingartakarin ið rindar gildið, altíð.

## Vísur sum oyra vil hoyra

**Vísubólkur úr Norðurlendska Háskúlanum í Kungälv fer á konsertferð fyrst í mars, harav eina viku til Føroya. Við í bólkinum er føroyska Edith Dahl Jakobsen, kend úr sangleikinum Fame hjá Studentaskúlanum**

**TÓNLEIKUR**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Tey fimm ungu, sum framføra eita: Gabriella, Jac, Timothey, Ida og Edith*

Komandi dagarnar sleppa føroyingar at hoyra norðurlendskar vísur, framførdar av ungum evnaríkum sangarum úr Norðurlondum. Stjärnbilderne er ein tónleikabólkur við fimm musikalskum ungdómum frá vísulinjuni á Norðurlendka Fólkaháskúlanum í Kungälv. Tey framføra norðurlendskar vísur, bæði egnar framleiðslur og traditionel løg.

Ein av limunum í bólkinum er føroyska Edith Dahl Jakobsen, sum nógv munnu minnast frá høvuðsleiklutinum í sangleikinum Fame, sum næmingar í Stundentaskúlanum framførdu fyri tveimum árum síðani.

Vísubólkurin fer á konsertferð tvær vikur í mars, harav fyrsta vikan verður í Føroyum, síðani til Danmarkar og til endans Skåne í Svøríki.

**Skráin fyri almennu konsertirnar er hendan:**

*Sunnudagin 2. mars:*
Kunningarstovan í Nólsoy kl. 16

*Mánadagin 3. mars:*
Virkishúsið í Klaksvík kl. 20:30

*Týsdagin 4. mars:*
Skúlin í Porkeri kl. 19

*Mikudagin 5. mars:*
Posthúskjallarin kl. 20

*Hósdagin 6. mars:*
Ungdómshúsið "Staðið" í Vestmanna kl. 20

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.